# Nógv sera góð tilboð

*Vit skulu tøma handilin, tí geva vit upp til 70 % í avsláttri*

# VIT GEVAST AT HANDLA

Allar HVS-vørur verða seldar við stórum avslátti
Seinasti dagur handilin er opin er leygardagin 12.juli 2008

*Vit takka viðskiftafólki okkara fyri stuðul gjøgnum árini*



- 30%

Villeroy & Boch
- Old Luxembourg
- Cascara
- Country Heritage
- Home Elements

Hardanger bestikk - 30%
- Ramona
- Anita
- Hedda
- Mira



**Sp/f Leivur Nattestad, Miðvágur, tel 333 509**





## SEV søkir eftir elektrikara, elinnleggjara ella líknandi til Sundsverkið

Á Eltøknideildini er eitt starv sum elektrikari, elinnleggjari ella líknandi til Sundsverkið leyst at søkja. Á deildini starvast í løtuni 3 verkfrøðingar og 4 elinnleggjarar.

Talan er um eitt spennandi starv við góðum møguleikum fyri bæði fakligari og persónligari menning. Tú fert at seta tíni fingramerkir á arbeiðini, ið skulu gerast.

Sundsverkið er størsta elverkið í Føroyum við einum mátti uppá umleið 45MW. Á verkinum eru 5 motorar. Tveir teir størstu standa í løtuni fyri eini stórari eltekniskari dagføring, og er ætlanin, at tann, ið settur verður, eisini fer at seta seg inn í hesa nýggju framkomnu SRO-stýriskipan.

Talan er í høvuðsheitum um útskiftan av láspenningstalvum, alarmskipan, last- og spenningsregulatorum, pumpustýringum og yvirskipaðu stýriskipanina. Eisini verður onnur útgerð á Sundsverkinum tengd at somu skipan, soleiðis at tað framyvir verður ein yvirskipað stýriskipan fyri alt elverkið. Á Sundsverkinum verður annars arbeitt við Siemens S7, ABB 800xA, Profibus osv.

Tann, ið settur verður, kemur at nema sær kunnleika til hetta gjøgnum skeiðvirksemið bæði hjá SEV og uttanlanda.

Tínar arbeiðsuppgávur verða millum annað:

- at vera við í dagliga viðlíkahaldinum av eltekniska útbúnaðinum og SRO-skipanini á verkinum
- innlegging og íverksetan av elinnleggingum og stýringum
- at verða við at finna feilir, sum koma á elútbúnaðin og bøta um hesar.

Tú:

- er útbúgvin elektrikari, elinnleggjari ella tilsvarandi
- er áhugaður í at arbeiða við SRO- og PLC skipanum, instrumentering og kalibrering av transmittarum
- dugir at arbeiða við stýringum og lykladiagrammum
- kennir til elinnleggingar og veitingaranlegg (SB6)
- dugir at arbeiða við teldu á vanligum støði
- dugir at samskifta á donskum og enskum

Vit ganga út frá, at tú er fleksibul og kann arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá ið brúk er fyri tí. Sjálvandi er tú fyrikomandi og lættur at arbeiða saman við.

Er hetta nakað, ið hevur tín áhuga, skal tú senda eina umsókn við prógvum til:

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postsmoga 319
110 Tórshavn

SEV

í seinasta lagi fríggjadagin 18. juli 2008.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Terja Nielsen, deildarverkfrøðing á 346800.

*SEV er grundað á eina samhaldsfasta, fólkaræðisliga skipan, har tann vinningur, sum fæst burtur úr elsøluni, verður í høvuðsheitum nýttur til framtíðar útbyggingar av framleiðslueindum og elkervinum. Á tann hátt verður vinningurin øllum Føroya fólki at gagni, og útbyggingar kunnu fara fram, so hvørt samfelagið mennist, og streymtørvurin økist.*

*SEV hevur eina veitingarskyldu, sum áleggur felagnum at veita øllum borgarum, virkjum, stovnum o.s.fr. støðugan streym alt samdøgrið. SEV hevur sostatt bæði góðsku- og kervisábyrgdina í Føroyum.*

*Starvsfólk hjá SEV verða útbúgvin og førleikament sambært lógarkrøvum til trygd og annað. Vitanin verður áhaldandi viðlíkahildin við bæði innanhýsis undirvísing og skeiðum og eftirútbúgvingum annars.*



## SÓKNAST VERÐUR EFTIR STARVSFÓLKI TIL STREYMOYAR OG EYSTUROYAR ØKI

Søkt verður bæði eftir fólki til føst størv og eftir avloysarum.

NÁTTARVAKTIR
Søkt verður eftir álítandi hjálparfólkum at vera náttarvakt heima hjá fjølbrekaðum børnum. Arbeiðsstaðurin er heima hjá børnunum, og umráðandi er tí, at náttarvaktirnar eru búgvin fólk, ið duga at laga seg til og at virða umstøðurnar í heiminum.

STARVSFÓLK TIL YMSAR STUÐULSUPPGÁVUR
Flestu uppgávurnar eru seinnapartar, um kvøldið og í vikuskiftunum. Arbeiðið fevnir í nøkrum førum um at vera við børnum í frítíðini og í øðrum førum um ansing og røkt í heiminum. Einstakar uppgávur eru um morgunin gerandisdagar. Talan kann eisini vera um samansettar uppgávur hjá fleiri børnum.

Arbeiðstíðin kann vera skiftandi, og tey, ið sett verða, mugu tola broytingar í starvinum.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er týsdagin 15. juli 2008 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn og møgulig prógv og viðmæli skulu sendast til: Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Argjaboðagøta 7, 160 Argir.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til stuðulsráðgevarnar á tel 35 35 70.

KREA

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi børn og ung, ið bera brek. Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Í skipanini starvast umleið 100 fólk.

stuðulsfólkaskipanin fyri børn

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo


# RUKO LÁSATÆNASTA

Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem



**Vit eru serkønir á økinum**

**VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ** · *TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA*

SKÁLATRØÐ 14 · TÓRSHAVN · TEL 30 10 20